**Aud í Soylu** (8)

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Føroyskir Sálarfrøðingar <mail@psykolog.fo> |
| **Sendt:** | leygardagur 26 januar 2019 15:03 |
| **Til:** | Heilsu- og innlendismálaráðið |
| **Cc:** | Guðrun Maria Mortensen |
| **Emne:** | Viðmerkingar til lógaruppskot um rúsviðgerð |

Til Heilsu- og Innlendismálaráðið.

Takk fyri Hoyringsskrivið viðvíkjandi lógaruppskoti um viðgerðarstovnar fyri rúsdrekka og rúsevnatrupulleikar.

Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar hevur viðgjørt uppskotið, og vit hava hesar viðmerkingar:

1.
Hugtakið/heitið 'misnýtarar' og 'misnýtsla'.
Vit meta, at hesi heiti eru misvísandi, fakliga ógreið og óheppin.
Vit vita væl, at hesi heiti verða nýtt í Danmark, sum tíverri ikki eitt undangonguland á hesum øki.
Heitini hava eisini á mannamunni ein moralskan undirtóna.
Hyggja vit hinvegin í altjóða flokkingarkervið **ICD-10** (WHO1993) síggja vit, at undir F10-F19: 'Mental and behavioural disorders due to psychoactive substance use', at ólíkar flokkingar eru av hesum trupulleikum:
**'Harmful Use** (nýtsla hóast álvarsligar avleiðingar) - og **'Dependence syndrome'** (bundni) eru høvuðsgreiningarnar á økinum, har greiðar treytir (diagnostic criteria) eru ásettar fyri at seta hesi heiti á trupulleikarnar.
Vit meta, at meirilutin av teim sum leita viðgerð fyri rústrupulleikar, koma undir flokkingina F1x2: 'Bundni' (likamligt/sálarligt/felagsligt) sum svarar til 'Dependence syndrome'.
Tað er tí fakliga heilt burturvið at nýta moralska heitið 'misnýtsla' í lóggávu á hesum øki.

2.
Flestu altjóða viðgerðarástøði á rúsøkinum síggja trupulleikan sum 'bio-psycho-social' í náttúru síni, og hetta krevur eina terapeutiska heildartilgongd til hansara.
Eitt nú, at hóast bundni at rúsdrekka/evnum kann hava eitt likamligt grundarlag, so er 'loysnin' ella viðgerðin og eftirfylgjandi batagongdin, av sálarfrøðiligum (psykoterapeutiskum) og felagssálarligum slag.
Samsvarandi hesum er tað viðkomandi, at medisinskur fakkunnleiki er ráðandi á tí partinum av viðgerðini, sum snýr seg um 'av-eitran' alla 'av-rúsing', abstinensviðgerð og likamliga stabilisering.
Men tá persónurin hareftir er 'clearaður' til eftirfylgjandi viðgerðina, tekur sálarfrøðiligi fakkunnleikin yvir: við psyko-edukatión, bólka- og einstaklingaterapi, tí tá skal persónurin 'latast í til' og læra at liva uttan rúsin.
Vit meta, at hetta er tann tilgongd og tað tvørfakliga uppgávubýti, sum altjóða viðgerðarstovnar sum eru í undangongu á økinum, taka undir við.
Neyðugt er at hyggja út fyri donsku landamørkini um vit skulu vænta framstig á rúsviðgerðarøkinum.

3.
Samstundis sum hetta er sagt, fáa vit ta gjøgnumgangandi fatan av at lesa lógaruppskotið, at rúsviðgerð eigur at vera eitt læknafrøðiligt/medisinskt øki, meir enn eitt sálarfrøðiligt.
Eitt dømi er tá tað stendur (s. 4 í 'Almennum viðmerkingum') at:
"persónar við umfatandi rúsdrekka- og rúsevnatrupulleikum eru ofta sera illa fyri kropsliga og sálarliga, og tí er avgerandi neyðugt, at serlækni er við í visitasjónini' (okkara undirstrikan).
Vit fara at minna á, at løggildir sálarfrøðingar eru autoriserað heilsustarvsfólk, og at metingar av sálarligu støðuni hjá fólki er okkara serøki.
Hóast hetta, so er tað enn bert 'ynskiligt' (s. 8n) at 'sálarfrøðingar teljast millum starvsfólkabólkarnar á einum viðgerðarstovni', meðan aðrar tilskilaðar útbúgvingar verða sagdar at vera 'neyðugar'.
Til samanburðar kunnu vit nevna, at vanligt er í okkara grannalondum sum t.d. Noregi, at løggildur sálarfrøðingur er fakligur leiðari á viðgerðarstovnum.

Hesar vóru viðmerkingar frá nevndini í felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar

vinarliga

vegna Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar
Kári Leivsson, formaður

**PS.**
Vit hava eisini sent hoyringsskrivið út til limir okkara.
Niðanfyri eru dømi um viðmerkingar vit hava fingið sendandi aftur.

***Viðmerkingar frá limum:***

"Í Kap 2, stk 4 stendur soleiðis: "Harumframt er tað ein treyt, at starvsfólkahópurin á einum viðgerðarstovni samanlagt skal hava viðkomandi útbúgvingar, dagførda vitan um og royndir við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð".

Seinni stendur sum viðmerking til stk. 4: "Somuleiðis er tað **ynskiligt** at sálarfrøðingar teljast ímillum starvsfólkabólkarnar á einum viðgerðarstovni".

Sum heild haldi eg at fakligu krøvini til starvsfólkahópin virka óambitiøs.
Sum eg skilji uppskotið, verður mælt til at hava sjúkrarøktarfrøðingar í starvi, umframt tilknýttar serlæknar.
Og tað er absolut gott og neyðugt.
Men eg hugsi eisini at tað er upplagt at sálarfrøðingar eru fastur partur av starvsfólkahópinum á hesum stovnum.
Og ikki at tað er ynskiligt, men eitt krav.

Tann bólkurin sum er fyrst nevndur, eru rúsviðgerar ella alkologar. Nù kenni eg ikki nóg nógv til hesar útbúgvingar, men eru hesar útbúgvingar góðkendar eftir einum ávísum leisti, ella kann man kalla seg rúsviðgera eftir at hava verið á einum stuttum skeiði? Tað hevði verið gott um krøvini til hendan bólk var meira nágreinað í uppskotinum fyri at tryggja eina fakliga dygd. Serliga tí at eingi krøv eru til at hesi starvsfólk hava eina heilsufakliga ella námsfrøðiliga grundútbúgving.

Sum eg skilji uppskotið, verður tað Heilsutrygd, sum kemur at standa fyri góðkenningum av stovnum. Sostatt kemur tann nevnd sum situr við hesari uppgávu eisini at hava stóran týdning í mun til kvalitets-tryggjan, og í mun til at ávirka starvsfólka samanseting. Tí hevur tað sjálvsagt stóran týdning hvussu hendan nevnd er samansett, og hvørjir fakbólkar eru umboðaðir har. Men tað kemur ikki fram her. Vita tit kanska nakað um tað?"

*Ein annar limur hevur hetta uppskot:*

"1. Sálarfrøðingur eigur at vera fastur partur av toymunum á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum og eigur - í tøttum samstarvi við hinar fakbólkarnar - at hava ábyrgdina av sálarfrøðiligu viðgerðini umframt supervisión av starvsfólki."

--

**FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR**
The Faroese Psychological Association
FO110 Tórshavn - Faroe Islands
mail@psykolog.fo - http://www.psykolog.fo